Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri:

Vit skilja ikki trupulleikarnar

- men um so er, at grindalógin krevur ábøtur, so fara vit at kanna málið

Ivaspurningar hava tikið seg upp í grindamálinum, tá dómsvaldið fríkendi grindamennirnar í Haraldsundi, har grind í fjør legði beinini, sum ongantíð hevur verið góðkend hvalvág.

Av tí at kunngerð um góðkendar hvalvágir júst tá ikki var í gildi, vóru grindamennirnir fríkendir.

Spurningurin um springarar, sum vóru hildnir til í Kollafirði 9. august 1990, skuldi sostatt einki ivamál verið um, av tí at tá var kunngerð um góðkendar hvalvágir í gildi.

Varafútin segði við Sosialin seinasta leygardag, at ákæran móti grindamonnunum í Kollafirði ikki skuldi verið trupul at reisa, av tí at har var alt grindadrápið sum tað var, óregluligt.

Í Degi og Viku sigur sami varafúti fríggjadagin, at grindalógin var so ógreið, at hon trongdi til ábøtur og at ivamál var um, hvørt ákæra fór at verða reist móti grindamonnunum í Kollafirði.

Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri, sigur við Sosialin, at teir hava fingið fundarboð frá fútanum. Hesin verður í dag. Ætlanin er at greina sundur, hvørjar trupulleikar eru við grindalógini, sum fútin skilir hana.

Kjartan Hoydal: - Tað stendur greitt í lógini, hvussu grind skal haldast til og hvør hevur ábyrgdina av, at alt gongur regluliga fyri seg.

- Sum vit hava skilt fútan, so er neyðugt at gera reglur fyri, hvussu menn skulu fyrihalda sær, tá slíkar reglur ikki kunnu fylgjast.


- Vit skilja ikki tulkingina hjá løgfrøðingunum í samband við springaradrápið í Kollafirði, tí har vóru als ongar reglur fylgdar.

- Hvussu er og ikki, so er tað dómsvaldið sum ger av, hvussu ein lóg skal lesast. Siga teir at reglurnar í lógini er ógreiðar, so mugu vit kanna tað.

- Tað var júst grindalógin frá 1984 við seinni broytingum í 1986, sum skuldi forða fyri at óregluligum atburði, tá hvalur verður hildin til.

Í Kollafirði kann tað sigast, at har var alt óregluligt, men nú fara vit at fundast um tað í dag, og vónandi fáa vit loyst málið, sigur Kjartan Hoydal.

Dagny



Kjartan Hoydal, fiskivinnustjóri: - Tað var júst grindalógin frá 1984 við seinni broytingum í 1986, sum skuldi forða fyri óregluligum atburði, tá hvalur verður hildin til

sosialurin

Gerist haldarar NÚ — og fáið alt hetta:

Einsamøll — eingi tíðindi

Haldið so: tíðindablaðið sosialin

og fáið henda góða vinin — Føroya mest lisna og mest endurgivna blað

5 ferðir um vikuna fyri bert **½ søluprís!**

— altíð fyrstur við tíðindini!



— 5 bløð um vikuna í 3 mánaðir fyri bert **195,-**

Haldið blaðið

- við teimum fjølbroyttu tíðindunum
- við besta trúvirðinum
- sum birtir upp undir skilagott og mennandi kjak
- sum er blað fólksins

tíðindablaðið sosialurin sjálvandi

- sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin -

Ja! Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.**

Haldaragjaldið er kr. **195,-** fyri ársfj.
Haldarar uttanlands gjalda kr. **230,-**/ársfj.
Goldið verður ongantíð fyri fleiri bløð enn tey, ið eru eftir at koma í einum ársfjórðingi.

Navn: _____

Bústaður: _____

Bygd/býur: _____

Okeypis Sosialurin rindar postgjaldið

64

tíðindablaðið sosialurin

Box 76
110 Tórshavn

Kannað postverkinum